STILLAR UPP TIL FÓLKATINGIÐ

STILLAR UPP TIL FÓLKATINGIÐ

# TÁ ZAKARIAS MUNDI KOMIÐ Á FÓLKATING

**Í 1971 hevði Zakarias Wang nóg nógvar atkvøður at verða valdur á Fólkating. Men teknikkur gjørdi, at Hákun Djurhuus varð valdur í staðin. Til næsta val fer tann tá 75 ára gamli fullveldisstríðsmaðurin at royna seg fyri fimtu ferð**

Eirikur Lindenskov

Í blaðnum mikudagin boðaði Zakarias Wang frá, at hann ætlar sær at stilla upp til næsta fólkatingsval við tí hyggju – tá hann verður valdur – at fáa í lag eitt ríkisting, sum skal gera av, hvussu vit sjálvi skulu skipa okkara viðurskifti í Føroyum. Tá Zakarias Wang er valdur á Fólkating fer hann at boða danatingi frá, at hann ikki tekur við løn frá Fólkatinginum.

Hetta er fimtu ferð, at Zakarias Wang stillar upp til Fólkatingsval, og fáur man hava verið so nær einum fólkatingssessi – í øllum førum nakar við so víðgongdum sjónarmiðum – sum Zakarias Wang.

Fyrstu ferð hann stillaði upp var til fólkatingsvalið 5. oktober í 1971. Tá átti Javnaðarflokkurin fyrra fólkatingsmannin, Johan Nielsen, og Fólkaflokkurin tann seinna, Hákun Djurhuus.

Tjóðveldisflokkurin hevði tá ongantíð stillað upp til fólkatingsval, so stríðið stóð millum teir tríggjar stóru flokkarnar, Javnaðarflokkin, Sambandsflokkin og Fólkaflokkin. Til valið í 1971 stilláðu umframt hesar tríggjar flokkarnar, eisini Sjálvstýrisflokkurin og Framburðsflokkurin upp. Og so var tað Zakarias Wang, sum stillaði upp uttanflokka.

Úrslitið av fólkatingsvalinum í 1971 var, at Javnaðarflokkurin varð størstur við 4.170 atkvøðum. Næstur var Sambandsflokkurin við 2.855 atkvøðum. Nummar trý var Fólkaflokkurin við 2.680, og nummar fýra Zakarias Wang við 2.410 atkvøðum. Sjálvstýrisflokkurin og Framburðsflokkurin fingu ávikavist 648 og 362 atkvøður.

Soleiðis vórðu valdir – skuldu vit hildið – Johan Nielsen úr Javnaðarflokkinum og Kristian Djurhuus úr Sambandsflokkinum. Men so var ikki. Tí Zakarias Wang og Fólkaflokkurin gjørdu listasamgongu. Harvið vórðu atkvøðurnar hjá fólkaflokslistanum og uttanflokkalistanum lagdar saman. Við í listasamgonguni var eisini Framburðsflokkurin. Tí fekk listasamgongan fyrst valda mannin. Tá slíkar listasamgongur vórðu gjørdar, so varð fyrst hugt eftir, hvør flokkur var størstur. Fólkaflokkurin fekk 270 atkvøður fleiri enn Zakarias Wang. Tí skil var Hákun Djurhuus úr Fólkaflokkinum fyrst valdi fólkatingsmaðurin, meðan Johan Nielsen úr Javnaðarflokkurin var næstvaldi. Soleiðis sæst, at tað var ein realistiskur møguleiki, at Zakarias Wang varð valdur í 1971.

Men um tað gekst Zakariasi Wang eftir ætlan, so hevði hann verið valdur við teimum atkvøðum, hann fekk. Tí hann hevði ætlanir um aðra listasamgongu:

– Eg hevði ætlað at gjørt listasamgongu saman við Sjálvstýrisflokkinum. Men teir vildu ikki. Høvdu vit gjørt tað, so hevði tann listasamgongan verið næststørst og vunnið á Sambandsflokkinum.

Soleiðis kann staðfestast, at tað var vantandi taktikkur, sum gjørdi, at Zakarias Wang ikki varð valdur á Fólkating við teimum 2.410 atkvøðunum, sum hann fekk.



Nr. 35 - 19. februar 2010 Vikuskiftis Sosialurin

Fyri 35 árum síðan:

## Sakarmálið hjá Zakariasi

Í februar 1975 fall dómur í Føroyarætti í sakarmálinum, sum Zakarias Wang hevði reist ímóti sjey av valevnunum hjá Tjóðveldisflokkinum í Suðurstreymoy til seinasta løgtingsval og formanninum í aðalnevnd floksins fyri skuldsetingar um straffbar viðurskifti, ið hesi høvdu sett fram í blaðnum 14. September og Útvarpi Føroya í november mánað í fjør móti saksøkjaranum.

Dómarin segði, at sannleikaprógv vóru ikki førd fyri skuldsetingunum, og dømdi hann tí tveir av teimum skuldsettu 14 daga hefti, meðan hini seks fingu 14 dagbøtur á 50 krónur, umframt at øll átta skuldu gjalda sakarmálskostnaðin.

Á myndini eru Zakarias Wang (h.m.) og verji hansara Halgir Winther Poulsen (v.m.). Saman við teimum eru Hanna Lisberg og Suni Jacobsen.

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór1975*



# Fimta royndin hjá Zakariasi

Stillar Zakarias Wang upp til komandi fólkatingsval, so verður tað fimta ferðin, hann fer at royna seg – og triðja ferðin, at hann ger tað uttanflokka.

Sum nevnt her á síðuni, so var tað bara tilvildin sum gjørdi, at hann ikki varð valdur fyrstu ferð hann stillaði upp í 1971.

Zakarias Wang var annars tjóðveldismaður, men Tjóðveldisflokkurin stillaði ikki upp til fólkatingsval fyrr enn í 1973, tá Erlendur Patursson varð valdur. Zakarias Wang var ikki á listanum hjá Tjóðveldisflokkinum til tað valið. Tað var hann heldur ikki í 1975, tá Erlendur Patursson varð afturvaldur.

Men í 1977 stillaði Zakarias Wang aftur upp uttanflokka. Hann var tá komin í stríð við Tjóðveldisflokkin og varð koyrdur úr flokkinum. Tað endaði við einum sakarmálið, og rætturin dømdi útblakingina ógylduga – og Zakarias Wang varð soleiðis dømdur til aftur at verða limur í Tjóðveldisflokkinum.

Til fólkatingsvalið í 1977 bjóðaði Zakarias Wang Tjóðveldinum listasamgongu, men tað vildi Tjóðveldisflokkurin ikki. Úrslitið av tí var, at Tjóðveldisflokkurin misti fólkatingsumboðanina til Sambandsflokkin, sum við Paula Ellefsen rættiliga hevði fingið vind í seglini.

Høvdu Tjóðveldisflokkurin og listin hjá Zakariasi Wang gjørt listasamgongu í 1977, so hevði hesin felags listin vunnið fólkatingsmannin hjá Javnaðarflokkinum, og so hevði Johan Nielsen ikki verið afturvaldur – men Erlendur Patursson í staðin.

Sambandsflokkurin fekk á valinum í 1977 5.183 atkvøður, Javnaðarflokkurin 3.681, Tjóðveldisflokkurin 3.057 og Zakarias Wang 891 atkvøður.

Í 1994 stillaði Zakarias Wang upp fyri Frælsisfylkingina og í 2001 stillaði hann upp fyri Tjóðveldi.

Vallógin er nú broytt soleiðis, at tað ber ikki til at gera listasamgongur. Tí ber ikki til at vinna flokkum neisur við slíkum listasamgongum. Spurningurin er bara, um Zakarias Wang ger Tjóðveldinum ónáðir við uppstillingini hesaferð, eins og í 1977.



# Skal skipa eitt ríkisting fyri Føroyar

**Málið hjá Zakariasi Wang við koma á Fólkating er at fáa skipað eitt ríkisting fyri Føroyar, soleiðis at Føroya fólk sjálvi sleppa at gera av okkara viðurskifti – og hann fer at boða danatingi frá, at hann onga løn skal hava sum fólkatingsmaður**

Eirikur Lindenskov

**– Eg fari at stilla upp til komandi fólkatingsval.**

**Tað sigur Zakarias Wang í Hoyvík, sum í lýsing í Sosialinum mikudagin sóknast eftir stillarum.**

**Zakarias Wang sigur í lýsingini, at endamálið við uppstillingini er at fáa í lag eitt ríkisting at gera av, hvussu vit sjálvi skulu skipa okkara viðurskifti.**

**– Tá ríkjasovastin eftir valið spyr, hvønn eg vil hava at standa fyri nýggju donsku stjórnini, fari eg at mæla til, at tann verður biðin, sum tekur undir við hesum ynski. Til tess at geva ynskinum enn størri tyngd, fari eg beinanvegin at bjóða hinum føroysku og grønlendsku fólkatingsumboðunum at vera saman við mær, sigur Zakarias Wang.**

**Hann sigur víðari, at tá tann forsætisráðharri, sum tekur undir við ynski hansara, er settur í starv, verður skipað fyri vali av ríkistinginum, og vit fáa eina stjórn, sum er javnlíki við ta donsku, og kann taka upp samráðingar við hana um viðurskiftini ríkjanna millum.**

**– Harvið kunnu vit koma burtur úr tí ódemokratiska og ólógliga stýrislagi, sum vit liva undir. Danmarkar ríki hevur fólkarættarliga skyldu at lata okkum sjálvi skipa okkara viðurskifti, sigur Zakarias Wang, sum vísir á, at henda skylda hevur verið misrøkt, tí stjórn Danmarkar hevur lønt embætismonnum sínum fyri her at taka avgerðir, sum okkara ríki sjálvt eigur at taka.**

**– Samstundis hevur stjórnin – óbiðin – álagt okkum at seta umboð á danating. Fyri at fáa onkran okkara at taka við hesum umboðum, hevur Danmarkar ríki álagt sínum skattgjaldarum at gjalda løn teirra.**

**– Hóast allar royndir prógva, at eingin kann tæna tveimum harrum, tí annar av hesum verður fyri vanbýti, halda summi, at umboð okkara á danatingi samstundis kunnu tæna Danmarkar ríki og okkara ríki. Men tá bert annar harrin rindar løn, er enn torførari at ímynda sær, at hin verður væl tæntur, sigur Zakarias Wang.**

**– Ríkini eru tí ikki javningar, og hetta er ólógligt.**

**– Fyri at gera mítt til at fáa hetta aftur á beint havi eg gjørt av, at eg, tá eg eri valdur, boði danatingi frá, at eg ikki taki við løn, sigur Zakarias Wang.**

# Zakarias seinkaði stjórnini hjá Jens Otto Krag

Eirikur Lindenskov

**Fólkatingsvalið í Føroyum í 1971 var hildið tvær vikur eftir fólkatingsvalið í Danmark og í Grønlandi. Tá valúrslitið í Danmark og í Grønlandi varð greitt, vísti tað seg, at stjórnarflokkarnir, Radikale Venstre, Venstre og Konservativu høvdu fingið 87 umboð og andstøðan 88. Tí kundu føroysku veljararnir gera av, hvør skuldi stýra í Danmark, ein borgarlig stjórn ella ein javnaðarstjórn.**

**Úrslitið í Føroyum gjørdi tó ongan mun, tí føroyingar valdu ein úr hvørjum blokki, Johan Nielsen úr Javnaðar-flokkinum og Hákun Djurhuus úr Fólkaflokkinum við stuðli frá atkvøðunum hjá Zakariasi Wang.**

**Í einum lesarabrævi í valstríðnum til fólkatingsvalið í 2001 greiðir Zakarias Wang frá sínum upplivingum frá fólkatingsvalinum í 1971:**

**» – Men royndir mínar frá fólkatingsvalinum 1971 sýndu, at samstarv við grønlendsku fólkatingsumboðini ofta kann hjálpa.**

**Tá var støðan tann, at fólkatingsvalið í Føroyum var fjúrtan dagar seinni enn í Danmark og í Grønlandi. Tá teir gjørdu upp vísti tað seg, at danska andstøðan kundi fáa ein meiriluta fyri nýggju stjórnini hjá J. O. Krag, um so var, at annar av teimum grønlendsku og annar av teimum føroysku fólkatingsmonnunum ikki greiddu atkvøðu.**

**Tá var eg uttanflokka valevni, tí Tjóðveldisflokkurin stillaði ikki upp. Eg segði við Fólkaflokkin, at eg hevði ikki stillað upp fyri at spjaða sjálvstýrisfylkingina í Føroyum, og beyð eg tí Fólkaflokkinum valsamgongu, so tann av okkara listum, sum fekk flestar atkvøður, kom inn á fólkating fram um einhvønn sambandsflokk. Hetta eydnaðist eisini, og fekk valsamgongan fyrst valda mannin.**

**Tá eg fann út av úrslitinum av tí danska valinum sá eg, at fekk J. O. Krag undirtøku frá tí nývalda grønlenska tingmanninum, Moses Olsen, so kundi hann skipa stjórn beinanvegin. Eg sendi tí telegram til Moses Olsen og bað hann geva kongi tað ráð at bíða við at skipa stjórn, til valið í Føroyum var av.**

**Hetta gjørdi hann. Tíverri fekk Fólkaflokkurin fleiri atkvøður enn eg, og bæði tann valdi fólkafloksmaðurin og Moses Olsen søgdu seg ikki blanda seg upp donsku politisku viðurskiftini. Júst harvið góvu teir J. O. Krag meiriluta fyri tí stjórn, sum gjørdi ta vanlukku at lokka Danmark upp í EEC.**

**Men bara hetta lítla samstavið millum Grønland og Føroyar var nóg mikið til at seinka hesa stjórnarskipan fjúrtan dagar.«**